LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA LANDCRUISER 4 x 4
biliga til sølu. Nógvir góðir lutir.
Tlf. 505010

CAMPINGVOGNUR TIL SØLU
Dethleffs Nomad. Árg. '88, 5-6 sovipláss, køk, wc og bað, sóldúkur fylgir við. Prísuppskot 50.000,-
Tlf. 333834, Fartlf. 223734, Peter

TOYOTA CAMRY TIL SØLU
Ein grønur Toyota Camry 2.2 XL til sølu um hóskandi boð fæst. Árg. 06/95, 120.000 km, sýnaður 02.04. Bilurin er væl hildin og er í sera góðum standi.
Tlf. 448608/218608

DIESELBILUR TIL SØLU
Ein reyður Ford Escort diesel til sølu. Árg. 04.96, 185.000 km, sýnaður 05.04 Bilurin er í góðum standi og hevur sleipikrók.
Tlf. 447181/220638

MYRKAGRØNUR GOLF
1,6 turbodiesel 1991 í góðum standi til sølu. Eykalutir av øðrum bili fylgja við.
Tlf. 457972

COROLLA DIESEL TIL SØLU
Toyota Corolla diesel árg. 96, sera økonomiskur, nýsýnaður.
Tlf. 220004

HONDA CIVIC MB4
árg. 5/98 við stórum skaða til sølu.
Tlf. 310300/284300

AMERIKANARI
Chevrolet Malibu Classic, 3.9 ccm, árg. 80, til sølu.
Tlf. 255789 eftir kl. 16

REYÐUR HONDA CIVIC 1.4 I
Til sølu vegna skúlagongd í Danmark. Bilurin er frá 98, koyrt uml. 65.000 km. Bilurin er væl hildin og í góðum standi. Er sýnaður 2004.
Tlf. 316640 eftir kl. 17.00

BMW 525 TD
árg. 93, km 131.000 Bilurin er í sera góðum standi, til sølu fyri 80.000. Bilurin sæst á bil.fo
Tlf. 213056

PÍKADEKK TIL SØLU
4 Bridgestone píkadekk stødd 195/75 R16 til sølu.
Tlf. 449251 ella 749251

TOYOTA TERCEL
4 wd árg. 86 til sølu.
Tlf. 503249

KARBURATORUR OG TENDRING
til Honda Civic 1.5 LSI til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 224910

SPORTFELGUR
4x100 við dekkum, 15" 195/50X15. Passa til Audi, Honda, Opel. VW, Mazda, Daiwoo og Toyota, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 224910

FORD SIERRA 2.0i GHIA
nýsýnaður til sølu fyri 10.000,-
Tlf. 210546

TOYOTA COROLLA SEDAN
Automatisk gear. Skrásettur 4/97. Motorur benzin 1,6. Koyrt 75.500 km. C.D. avspælari. Powerstýring. Vel. 4 píkadekk fylgja við
Tlf. arb. 457344, heima 456344 eftir kl 18

TOYOTA COROLLA 1.3 SEDAN
Árgang 1998. Km. 81.000. Hvid og meget velholdt. Påsat tuningsboks og KN-luftfilter. Et sæt pigdæk medfølger. Sælges på grund af flytning for kun 75.000 kr. Interesserede kontakt os på
tlf. 520202 efter kl. 17

TIL SØLU
11 ára gamal silvurgráur Toyota Corolla STW 2.0 diesel, 258.000 km. á sportfelgum og góðum dekkum. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 273627

BILSETUR TIL SØLU
2 spildurnýggj baksetur á 3 sitipláss bíliga til sølu. Vælegnað til minni buss ella vøruvogn.
Tlf. 219325

TIL SØLU
Ford Sierra 1,6 árg. 88 til sølu fyri 7.000. Við fylgja 4 píkadekk á felgum. Eisini fylgja aðrir eykalutir við.
Tlf. 226883 eftir kl.15.00

CIVIC KÚFANGARAR
Kúfangari framan og aftan, til Honda Civic 98 2 hurðar. Teir eru lakeraðir silvurgráir. Kúfangarin framman hevur innbygdan spoylara, selist bíliga hvør sær. T-brævr:
chrisgu@post.olivant.fo, tlf. 314944/580604

OPEL VECTRA
2.0 DTH, árg. 98 til sølu.
Tlf. 260916 eftir kl. 18

SVARTUR PEUGEOT 106
til sølu, árg. 97, hevur koyrt 84.000 km. Áhugað ringi á
tlf. 227257/443210

TOYOTA LANDCRUISER
Jeepur til sølu, árg. 94, 195.000 km, nýggjar 15" alufelgur við breiðum dekkum. Prísuppskot 120.000 kr.
Tlf. 217090/212662

MAZDA PREMACY
Árg. 2003, koyrt 11.000 km. til sølu.
Tlf. 210979

16" SPORTFELGUR
108 x 4 við dekkum 205/55-16 eru til sølu. Passa til Ford, Peugeot o.a. bilar. Prísur 3.500,-
Tlf. 583053

NISSAN PATROL TIL SØLU
árg. 88, styttra modellið, nýsýnaður, hoyr nærri á
tlf. 220305 eftir kl. 15

OPEL ASTRA 1.6
Árg. '98, koyrt 53.000 km, sera væl hildin, bíliga til sølu.
Tlf. 220549

ELLISAKFAR
Saab 96, árg. 1964, 2 takt, 3 syl, til sølu ella í býti við skutara.
Tlf. 219988

PÍKADEKK
Fýra óslitin píkadekk á 16" felgum, eru til sølu.
Tlf. 373278

BILUR TIL SØLU
Ein Mitsubishi Lancer, st., árg. 1987, til sølu fyri kr. 4.000.
Ringið 748446

VEGNA BURTURFERÐ
er ein Volvo 340 DL til sølu, sýnaður 3.3.04, sær væl út og koyrir væl. Økonomiskur 1700 cc motor. Kr. 15.000,-
Tlf. 263452

PÍKADEKK TIL SØLU
4 Firestone píkadekk, sum nýggj, 185/65/14.
Tlf. 770086/444811

FORD SIERRA
árg. 1989, reyður, koyrt 160.000 km, til sølu.
Tlf. 504113

MITSUBISHI LANCER
árg. 87, diesel, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 721451/421451

FORD FIESTA DIESEL
árg. 95, koyrt 175.000 km, til sølu.
Tlf. 332203/221866

SPORTFELGUR TIL SØLU
4 stk. 15" við dekkum, stødd 195/60-15.
Tlf. 448423/264102

VÆLHILDIN NÝSÝNAÐUR DIESELBILUR TIL SØU
Zitroen ZX, árg. des. 1996, 1.9 diesel. Vínreyður, stationcar, sportfelgur, koyrt 155.000 km. Sera bíliga til sølu. Ring á
Tlf. 271144 ella 333344

SPORTFELGUR TIL SØLU
4 stk. sporttelgur til sølu, 17" passa til BMW.
Tlf. 448423/264102

SUZUKI ALTO 1.0
Árg. 7/99, koyrt 28.000 km, vælhildin, til sølu.
Tlf. 213577

MAZDA 323 1.5
árg. nov. 96, koyrt 112.000 km, við sleipikróki og anleggi. Bilurin er í góðum standi og selist um hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 583034

TIL SØLU
Scania 112 betongblandari og Scania 143 trekkjari v/ hydraulikki og retardara.
Tlf. 210452

ROVER 25
1.6 109 HK, 08/2003, 9600 km, 5 hurðar, leðursetur + leðurróðar og gearknott, aircondition, el-rútar, el-spegl við hita. Fløguspælara, mjøkralyktir, metallak (grønur). 4 heilársdekk á felgum fylgja við. Nýprísur 188.000 kr. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222914

PEUGEOT 106 1.1i
árg. 96, koyrt 80.500, sýnaður mars 04, til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222888

4 SPORTFELGUR 15''
Av merkinum Titanium til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 254115

MAZDA 929 HATCHBACK
til solu. Bilurin er nýliga gjørdur í stand og sýnaður í august. Hann er frá 84. Hevur aut. gear. Ringið og hoyri nærri á
tlf. 503630 ella 221084

HONDA CIVIC 1.5i
V-Tec, 5 hurðar, senkaður, 16" Azev felgur, árg. 1998, áhugað kunnu ringja
tlf. 217764

TIL SØLU
Peugeot 306 1.4, árg. 1996, koyrt 83.000 km. Toyota Avensis (2000) árg. 99, koyrt 112.000 km til solu.
Tlf. 441642

HEVUR TÚ EIN
Hilux / Hiace motor at selja mær.
Ring so á tlf. 543066

MAZDA 323 DIESEL
árg. 10/98, koyrt 142.000 km, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 218778

KIA PRIDE GLX I
Arg. 98. 1,3 koyrt 54.000 km. Biliga til solu.
Tlf. 314246

OPEL ASTRA 1.7 T
Diesel, er biligur í brúki, er nýsýnaður, árg. 95, til sølu.
Tlf. 509897

VW GOLF
árg. 88, 2 hurðar, 1.6 TDI til sølu.
Tlf. 507541

TIL SØLU
4 stk. 15" Ford ori. alufelgur, krom look við Toyo 195/50-15" summardekkum, passar á Fiesta, Puma og Escort, prísur 3.000 kr. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 259335

HEILÁRSDEKK
2 stk. Debica 185/70-14" 2 stk. Dayton 185/70-14" til sølu fyri 1.500,- kr. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 259335, Tórshavn

CITROEN ZX 1.9 DIESEL
st.car sera bíliga til solu. 7 1/2 ára gamal. Bilurin er nýsýnaður, vinreyður, sportfelgur, vælhildin.
Tlf. 271144/333344

DIESEL BILUR TIL SØLU
Toyota Carina 2.0 TD árg. 96 til sølu.
Tlf. 227112

SAAB 9-3 2.0i T
árg. 03. sept. 14.000 km, jubileumsmodel, myrkablúar, svart leður innan, auto aricon, 16" alufelgur. Nýprísur 235.000,-, til sølu vegna flyting.
Tlf. 212101 ella 373373

PÍKADEKK Á FELGUM
til sølu, 165 R14, felgurnar hava 4 hol, 1.600,- kr.
Tlf. 214142, Kollafjørður

TIL SØLU
Reyður Ford Escort, sportmodel 1.8i 135 HK, árg. 1995, koyrt 170.000 km, til sølu fyri 25.000 kr.
tlf. 254133

VØRUBILUR TIL SØLU
Ein hvítur Mazda E2200 diesel til sølu. Árg. 05.89, 160.000 km
Tlf. 447181/220638

VW GOLF VR6
árg. 92 í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220511

MAZDA 626 2.0 COUPE
árg. 89, nýlakeraður og nýsýnaður, ongan kross. Nógvir skiftir deilir, senkaður, alu-felgur, spoylarasett, cd-radio. Nógvir eykalutír. Annars sí www.bil.fo
Tlf. 252506

HJÁLP!
Er tað nakar, sum hevur ein jeep at selja mær, skal vera í góðum standi og ikki ov dýrur, so ring til mín á
tlf. 252506

VOLVO 440
árg. 1990 í góðum standi, til sølu. Prísur 20.000 kr. Sýnaður í mai.
Tlf. 452067

Amboð

TIL SØLU
Kosmetolog útgerð til sølu.
Tlf. 319182

PLATTAVOGNUR
til solu fyri 1500 kr.
Tlf. 224910

KONTAINARI YNSKIST
Góður brúktur 20 fóts kontainari ynskist til keyps.
Tlf. 262204

YNSKIST TIL KEYPS
Ein viðfestivognur 500 kg. úr finer. Vinarligast ring
Tlf. 282201

DIESEL TRUKKUR TIL SØLU
Linde 3 tons. Gev eitt boð.
Tlf. 507417

GRAVIMASKINA
3,5 tons gravimaskina við brekkara til leigu. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 421535 ella 267116

BLANDIMASKINUR OG TRILLUBØRUR
Tilboðsprísur í september.
Kaj Andreasen, tlf. 315600

GRAVIMASKINUR TIL LEIGU
Tilboðsprísur í september. Umframt nógv onnur útleiguamboð.
Kaj Andreasen & Co., tlf. 315600

VARIANT VIÐFESTISVOGNAR
Ymisk modell á goymslu.
Tlf. 315600 Kaj Andreasen & Co

Arbeiði

RÚNI SØRENSEN
Alt timbur- og snikkaraarbeiði verður gjort, nýtt sum gamalt, úti og inni.
Tlf. 212700

YNSKIST
18 ára gomul genta søkir arbeiði í Suðuroy ella í Suðurstreymoy, alt hevur áhuga.
Tlf. 251986

FA. HÚSAUMVÆLING OG HÚSASMÍÐ
Alt timburarbeiði verður gjørt. Nýtt sum gamalt, úti sum inni. Royni okkum.
Tlf. 215214

Barnaansing

BARNAANSING
Vit eru tvær gentur, sum fegin vilja vera barnagentur eftir skúlatíð og um kvøldarnar.
Tlf. 316312

Barnaútgerð

GRULVIGARÐUR
ynskist til keyps.
Tlf. 444447

BARNASTÓLAR OG BARNABORÐ
úr timbri, 2 stólar, 1 bonkur, 1 borð til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Myrkablàur Odder barnvognur
Tlf. 456832

TIL SØLU
Ein svartur Simo barnavognur, bert brúktur til eitt barn. Við fylgir babylift og flugunet. Nýprísur 5.600 kr. Til solu fyri 3.000 kr.
Tlf. 455582, 509215 Tove

BILSTÓLUR YNSKIST
til keyps til barn sum er 1 ár.
Tlf. 373081/254781

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Ein vælhildin gráur Emaljunga barnavognur við lufthjólum, babylift, regnslagi og fluguneti til solu fyri einans 3.500 kr.
Ring 310036/264541

BARNASONG v/ STIGA
Lakerað fura, madrassa, botnur og forhang fylgja við. 90X200. Biliga til solu.
Tlf. 314246

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Ein svartur »Trille-Fix« barnavognur v/lift, fluguneti og regnslagi til solu fyri kr. 3.000,-, nýprísur kr. 5.237,-. Lítið og onki brúktur. Keyptur 1/2 febr. í ár.
Tlf. 317807 ella 506809

BARNASONG VIÐ BOTNI
longd 140 cm. br. 64 cm.
Tlf. 316692

Bátaútgerð

EYKALUTIR TIL VOLVO MD 30
Eykalutir til Volvo MD 30, m.a. innsúgvings- og útstoytsmanifold við útstoytsslangu, eisini er ein Ø=85 mm útstoytsslanga. Eisini eru nøkur kølivatnsrør v.m.
Ring á tlf. 222511 ella 215804

TIL SØLU
10 stampar 5,5 mm svøvlalína til sølu.
Tlf. 449251 ella 749251

GAMALT TÍGGJUMANNAFAR
við 36 HK Volvo Penta motori, fiskiloyvi 5B, 3 BJ. El-snellur, Simrad-Shipmate GPS. Plottara og ekkolodd saman, og Furuno 200 pappírs ekkolodd. Til solu fyri ein sámuligan pris.
Tlf. 361206/222670

YNSKIST
Páhangsmotorur ynskist, alt omanfyri 50 HK hevur áhuga.
Tlf. 213195

TIL SØLU
Ein 15 fót segljolla av slagnum »Norðborg jolle«. Eitt sett av seglum við spilara, vogni og el-páhangara fylgja við. Prísur 10.000 kr.
Tlf. 210355

TIL SØLU
Litekkolodd og snella d7/5000 svensk.
Tlf. 581743

STARLET 26
við fiskiloyvi, 65 HK Saab motori, línuspæli v/ magnetkobling, VHF, plottari, ekkoloddi, oljukabúss og bjargingarbáti, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 213399

GOGGUKNÚSARI
(nýggjur) úr rustfríum stáli, 220 volt, til sølu.
Tlf. 282246

YNSKIST TIL KEYPS
5–7 HK motorur ynskist til keyps
Tel. 311041 ella 581208

HJÁLP HJÁLP
Er tað nakar sum eigur eina róðurpumpu til hydrauliska stýring á smábátum, so ring
Tlf. 721882

TIL SØLU
Caterpiller motorur, typa 3208, í góðum standi.
Tlf. 282246

TIL SØLU
Vinkulgear, fabrikat Servo. Typa V/D 60C. útv. 1.9:1 og skrúvugreiðir við umstýring.
Tlf. 282246

BÁTAMOTORUR YNSKIST
Bátamotorur 40-50 HK við skrúvu og aksli ynskist til keyps.
Tlv. 373885

SUZUKI
páhangsmotorur 8 HK til sølu.
Tlf. 332381

Bingo

BINGO
Verður í Stórhúshøll leygarkvøldið 11. sept. kl. 19.00.
ÍF Fótbóltur

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 16. september kl. 19. 6. og 12. spæl 500 kr. gávukort. Á lutaseðli millum annað tvær ferðir 500 krónur gávukort, balja full av mati og nógv annað gott. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

EYDNUHJÓL
Verður í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 11. sept. Byrjar kl. 16.00.

GOTT BINGO
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi týskvøldið 14. september kl. 19.00. Øll eru vælkomin.
H.S.R.

GOTT BINGO
verður leygarkvøldið 11. sept. kl. 20.00. At vinna havhestar, lundar, kalvi, rækjur o.a. Burturlutað verða m.a. 5 før. krov til heystar. Moguleiki er at spæla gullbingo, 21 spæl og Dannebrog. Eisini verður spælt minibingo, bingola og 20 kr. spæl.
Kaggin

FRÁ SPASTIKARAFELAGNUM
Gott bingo verður mánakvøldið 13/9 kl 19.00, at vinna full pláta 400 kr., á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 500 kr. og tvey á 1000 kr., drigið verður millum spølini, eyka spæl, koyring heim. Øll er hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 12. sept. kl. 16.00. Høvuðsvinningur: Gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 1.200 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 20.septembur 12 plátur 100 kr. Drigið verður í millum spølini. Høvusvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

ER NAKAR
sum hevur Biologi pá tværs og Spring ud, til sølu?
Tlf. 251783 ella 319213 e. kl. 16

BØKUR TIL STUDENT OG HF
til sølu.
En vivo tekst og øvebog, 100 kr., Nøgle til de spanske veber, 80 kr., Nøgle til den spanske grammatik, 80 kr.,
Søgufrøði, 100 kr.,
Store linjer i verdens historien, 150 kr.,
English grammer in use, 80 kr., Ram pá biologien við cd-rom, 270 kr.
Ring og spyr eftir Poulu á
Tlf. 228351 ella 315090 eftir kl. 19.00

BØKUR FRÁ READER DIGEST
25 Det Bedste bøger, innbundnar, til sølu fyri 30 kr. stk.
Tlf. 441605

Burturm. /funnið

VILSTUR
Ein grágásarungi er upptikin á Dalagotu 23, stendur á høgra vongi.
Tlf. 210448

HEVUR NAKAR FUNNIÐ
mín ljósabláa og hvíta »Five Seasons« jakka í nonnuskúlagarðinum á ólavsøku? So vinarligа ring á
tlf. 262227/423551, Bjørt

RINGUR FUNNIN Í SANDVÍK
Ein gullringur, kanska ein trúlovilsisringur, við perlu í, er funnin á sandinum í Sandvík. Í ringinum stendur K.P.V.A og ein dagfesting. Hon ið heldur seg eiga, kann ringja á
tlf. 255546 (eftir kl. 18)

TÚ SUM VAR INNI
í solubúðini ALV fyrst í hinari vikuni, og gloymdi 1 posa við svimjiklædum í, tú fært tað aftur, um tú kemur inn her.
Tlf. 313667

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Ynskir tú ein góðan leigara, so má eg vera tann rætti, ring til mín á mobil
509005

ÍBÚÐ SØKIST TIL FRAMLEIGU
Vit eru 2 ungar gentur, sum ganga á heilsuskúla,vit leita eftir íbúð ella 2 verilsum í Tórshavn til framleigu ´frá viku 44 í ár og til viku 07 2005. Er tað nakar, ið kann hjálpa okkum ring so
Karina 263005 ella Ruth 221894

VIT ERU UNGT PAR
við einum 1 ára gomlum barni sum ynskja eini hús ella eina íbúð til leigu í Sandavági ella Miðvági.
Ring 586058, Hans

KAMAR TIL LEIGU Á ARGJUM
Hevur tú hug at deila eini stór hús við 3 ungum? Tú fært títt egna kamar og skalt ikki drekka ella roykja. Kanst flyta inn beinanvegin. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 592020 ella 223830

SUMMARHÚS Í SØNDERVIG BÍLIGA TIL LEIGU
Træ summarhús við Vesturstrondina til leigu. Køkur, stova, wc v/ brúsu og 3 sovirúm v/ 6 soviplássum. Tætt við strondina, innandura baðland og aðrir aktivitetir. Góðir innkeypsmøguleikar. Ring
Tlf. +45 97224057 ella +4520704657

FRÍTÍÐARHÚS Í NÓLSOY
Slappa av í gomlu Petersen húsunum (nýrenoveraði).
Tlf. 212717/222327

STÓR HÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, eru eini stór hús í Sørvági til sølu.
Tlf. 332825 og 333012

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma fyrst í 30´unum við einum barni søkir íbúð/hús til leigu í høvusstaðarøkinum. Eg hvørki royki ella drekki, og eg fari væl um. Eg havi fast starv og gjaldi til tíðina.
Vinarliga ring 262179

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt par søkir íbúð í Havn. Vit fara væl um og roykja ikki. Hava arbeiði sum timburmaður og lærari. Max. 4.000 kr. pr/mør.
Vinarliga ring 220819

HÚS Á NESI
(Eysturoy) til leigu fyri 4.500 uttan el og hita.
Tlf. 260916 eftir kl. 18

SETHÚS A BYGD
Til leigu í styttri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 508878

TVØROYRI
Skulu tygum til Suðuroyar og búgva væl? So eru hús í miðbýnum til leigu vikuskifti ella styttri tíðarskeið. Sera vakurt útsýni yvir Tvøroyrarfjørð.
Tlf. 312205 ella 261560

ÍBÚÐ YNSKIST
23 ára gomul genta søkir íbúð í Havn. Fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 222457

KAMAR TIL LEIGU Í HAVN
Kamar til leigu til ungt fólk. Atgongd til allar hentleikar, sum skal deilast við 3 onnur.
Tlf. 222457

HUG AT DEILA EINI HÚS
við 3 øðrum? Eitt kamar bíðar eftir tær. Tú fært tína egnu altan og hevur atgongd til allar vanligar hentleikar. Leiga 2500,- um mán. dep. 3500,- skal gjaldast innan innflyting.
Ring ella sms á 269196 eft. kl. 18

ÍBÚÐ Á AMAGER
Vit eru 3 læraralesandi, ið skulu niður í praktik í januar og kundu vit hugsað okkum at leiga á Oyrasundskollegiinum (ella aðrastani á Amager) hetta tíðarskeiði. Um tú hevur eina íbúð, ert tú meira enn vælkomin at ringja til okkara
Tlf. 558889

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par, ið leita eftir einari íbúð í Suðri ella í Suðurstreymoy.
Tlf. 220917

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
Er tað nakar, ið hevur eina íbúð í Runavíkar kommunu til leigu. Vit eru eitt par og vit gjalda til tíðina.
Tlf. 779990

KØMUR/ÍBÚÐ/HÚS TIL LEIGU
Nýistandgjørd hús í Vági, ómøblerað, 2 køkar, 2 baðirúm, ring og hoyr nærri.
tlf. 373787/505056 eftir kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig kvinna, fyrst í 30'unum við 2 børnum ynskir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Fara væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 456978/583414

ER TAÐ NAKAR
sum hevur eina íbúð at leiga okkum í KBH. frá 21.-25. okt. Vit eru 2.
Tlf. 264071

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HOYVÍK
Nýggj íbúð til leigu frá hálvum sept. Køkur, stova í einum, gongd, kamar, wc og egin inngongd. uml. 60 fermetrar. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1911/1

ÍBÚÐ
80 fermetra íbúð at deila við ein annan persón sum býr her, at leiga í Havn. Allir hentleikar eru.
Tlf. 314805/264903

ÍBÚÐ YNSKIST
Kvinna í 30'unum søkir íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Eg fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 313690 eftir kl. 19/513690

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Liggur miðskeiðis í Havn, køkur, stova, kamar, baðirúm. Atgongd til vaskimaskinu. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1907

KAMAR TIL LEIGU
Ert tú friðalig/ur og fer væl um, havi eg eitt kamar til leigu við atgongd til køk og bað 1. september.
Tlf. 316916 ella 506489

SKRIVSTOVUHØLI TIL LEIGU
Í miðbýnum. Uml. 200 fermetrar.
Tlf. 315438

Dansur

NORÐSTREYMOYAR DANSIFELAG
Heystdansikvøldið hjá felagnum verður leygarkvøldið tann 25. sept. 2004 kl. 22.00 í Bygdarhúsinum í Kollafirði. Øll eru vælkomin og nýggir limir kunnu tekna seg. Kostnaður 50 kr.
Nevndin

Dýr

SERA FITTUR KETTLINGUR
burturvilstur, hevur hálsband, er svart/hvítur og hevur tumlar á forlabbanum.
Tlf. 310345

KETTA UPPTIKIN
Á Argjum hevur ein svartur og hvítur hálvvaksin kettlingur gingið í nógvar dagar. Eigarin kann ringja
tlf. 310669

RASUHUND?
Ein west highland white terrier hvølpur til sølu. Ring og hoyr nærri á
tlf. +45 40684836

BORDER COLLIE
sera fittir hvølpar fáast við at avheinta teir. Ring og avtala tíð á
tlf. 217214

ER TAÐ NAKAR,
sum vil hava okkara fitta frens: Melvis, verður 1 ár 28. november. Elskar at spæla við børn.
Tlf. 371825

HVØLPAR
4 hvølpar til sølu fyri 100 kr. 2 hundar og 2 tíkar, 1 brúnur og hvítur og hini trý eru svørt og hvít. Vilt tú gjarna hava ein hvølp, so ring
tlf. 273279

SPØK KANIN
verður latin, útíbúr kann eisini fáast.
Tlf. 265325

HUNDAHVØLPAR LATAST
Vegna plásstrot verða tveir hundahvølpar latnir. Annar er 3 mánaðir, og hin er 10 vikur.
580472

GÓÐUR ÍSLANDSHESTUR
13 ára gamal, vid saðli, til sølu.
Tlf. 510088 ella 315891

ER TAÐ NAKAR
ið vil selja mær eitt útikaninbúr.
Vinarliga ring 320325 ella 261672

MASSIVT
horna fuglabúr, lútað træ, bíliga til sølu.
Tlf. 770086/444811

SERA FITTUR KETTLINGUR
lagdur 16. juli, er vanur við børn, dugir at eta sjálvur og er reinligur. Verður latin djóravini.
Tlf. 448777

ER TAÐ NAKAR
ið kann selja okkum eitt ca. 50 l. akvarium við ljósi og pumpu (ella meir).
Tlf. 221338/319028

DVØRGAHAMSTRARA-UNGAR
Dvørghamstraraungar, 7 vikur, til sølu, 50 kr. stk.
Tlf. 313915

GOLDEN RETRIVER!
Er tað nakar, sum hevur ella skjótt fer at hava eina Golden retriver hvølp at selja?
Tlf. 273064

DVØRGAHAMSTRARI
Lítil fittur dvørgahamstrari til sølu.
Tlf. 509630/42169

KETTLINGUR FUNNIN
Svartur og hvítur kettlingur funnin við Shell á Hálsi 26/27. august. Hann er mest svartur og hevur eitt grátt hálsband um hálsin.
Tlf. 311430/313484 ella 511430/262482

NETTA HEVUR FINGIÐ
kettlingar sum nú eru klárir at flyta heimanífrá. Eru fittir og róligir. Ring um tú kundi hugsað tær ein kettling frá okkum.
Lávus, Egi og Hjalti., tlf. 328095/214477

MARSVÍNAUNGAR
2 marsvínaungar kunnu fáast.
Tlf. 317880

Fundir

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 15. september kl. 19.00. Elin Mortensen sigur frá.
Pensionistafelagið í Havn

DANSIFELAGIÐ Á LÁTRINUM
Ársaðalfundur verður á Látrinum 21. sept. kl. 20.
Nevndin

Húsarhaldstól

NÝGGJ UPPVASKIMASKINA
Zanussi til solu vegna flyting fyri 4.000 kr.
Tlf. 443209

FRYSTIBOKS
ca. 400 l. til solu.
Tlf. 503249

Innbúgv

TIL SØLU
Baðikar og brúsubakki 80 x 80 til solu fyri 600 kr.
Tlf. 226315

INNBÚGV TIL SØLU
2 + 3 mannasofa, Horna skriviborð við reol og "direktør" skriviborðstóli. Sær út sum nýtt. Verður selt fyri hálvan pris.
Tlf. 311842 eftir kl. 17

REOLVEGGUR TIL SØLU
3 sektiónir. Mát tilsamans 178x254. Yvirskáp v/rútum + ljós. Annars skuffur. Selist bíliga. Sí mynd á
www.dalsgaard.info/dale

SOFA TIL SØLU
2 manssofa 71 x 123 cm. ikki leður, til solu fyri 300 kr.
Tlf. 271723

HORNASOFA
bíliga til solu.
Tlf. 444185

TIL SØLU
Vask og wc-møblar við tilhoyri til solu.
Tlf. 312968

SOFABORÐ
til solu fyri 500 kr.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Lítið brúkt dupult sovisofa til solu fyri bert 700 kr. vegna feilkeyp.
Tlf. 214166

MØBLER SÆLGES
Reol 800 kr. Computerhjørnebord 300 kr. Begge i lys bøgelaminat.
Oliebehandlet skænk med 6 skuffer og to skabe 500 kr.
Tlf. 520202 efter kl. 17

AVHEINTINGARTILBOÐ
Skrivaraborð, reolir og sovibrík til barnakamar fáast við at avheinta tað.
Tlf. 373868

EINKULT BOXMADRASSA
Við topmadrassu og beinum til solu fyri 600 kr.
Tlf. 212818

3 MANS SOFA
(dupult sovisofa) til solu.
Tlf. 224158 eftir kl. 15

SOFASETT TIL SØLU
Sofa til 3 persónar, 2 lenistólar og eitt sofaborð.
Tlf. 250211

TELDUCAFÉ-BORÐ
Merki: Kinnarps, pláss fyri 4 teldum, til solu fyri 1.900 kr.
Tlf. 219988

TIL SØLU VEGNA FLYTING
»Arenda« karnapskáp úr oljuviðgjørdari furu, glasrútar og ljós. H. 206, b. 188, d. 53, í góðum standi fyri 6.000 kr.
Tlf. 447143/229960 eftir kl. 17

TIL SØLU
1 sofaborð, lakerað fura, stórt, 500 kr.
1 telduborð, ljóst v/ 3 hillum, 500 kr.
Tlf. 315451

TIL SØLU
Tvær nýggjar boxmadrassur við topmadrassa, til solu vegna plásstrot.
Tlf. 510490

TIL SØLU VEGNA FLYTING
1 stk. 2 pers. sofa,
2 stk stólar,
1 stk. borð,
1 reól,
2 smáar reólir, alt úr bambus.
Tlf. 510490

OLJULÚTAÐ HORNASOFA
og stólur v/reyðum betrekki+ sofaborð verður selt fyri kr. 2000,00.
Tlf. 319174-225347

CAFÉ BORÐ YNSKIST
til keyps. Um tú eigur eitt runt café borð úr træi, uml. 42 cm í diametur (má gjarna vera gamalt) tú fegin vil sleppa av við, so vinarliga ring til mín á
tlf. 318811 eftir kl. 17.00

TIL SØLU
2 springmadrassur bíliga til solu 70x200 cm.
Tlf. 314944 - 580604

SOFA
Beige litt sofa 200 cm long (ytri mát) við leysum ryggpútum til solu fyri 1000 kr.
Tlf. 314123

TIL SØLU
Song 90 x 200 uttan botn við madrassu, til solu fyri 200,-
Sjónvarpsborð 300,-
Tlf. 214142, Kollafirði

YMIST TIL SØLU
Ein dupultsong 180 x 200 kann fáast við at avheinta hana vegna flyting, og ein Zanussi turkitrumla til solu fyri 500 kr.
Tlf. 269446

SPISEBORD
Spisebord í indonesisk træ 180x90 cm. inkl. 4 stole kr. 1.500,- og sofa med sofabord kr. 600,-
Se billeder på
www.kroejgaard.dk/tilsalg/
Tlf. 441984/741984

TIL SØLU
Gott ljóst lútað telduborð til solu fyri 500 kr.
Ljóst lútaður skenkur til solu fyri 300 kr.
2 hvítir boksstólar til solu fyri 100 kr.
Tlf. 318450

GÓÐIR MØBLAR TIL SØLU
Sera gott sofasett 3+2 til solu fyri 1000 kr. Ljóst lútað sofaborð til solu fyri 400 kr.
Tlf. 318450

Lýsingartekstur

_____
_____
_____
_____
_____
_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑